J. nr. 2010-0231/7

Reglugerð um útiborðreiðing í almenna rúminum í Tórshavnar kommunu

Gildisøki

§1 Reglugerðin er galdandi fyri útiborðreiðing á kommunalum øki í sambandi við virksemi hjá matstøðum t.e. matstovum, kaffistovum, kaféum o.l. í Tórshavnar kommunu.
Stk. 2. Reglugerðin umfatar ikki hissini loyvir

Loyvi

§2 Áðrenn útiborðreiðing kann byrja, skal loyvi til virksemið fáast til vega frá fútanum, sbr. grein 34, stk. 1 í politiviðtøkunum fyri Tòrshavnar kommunu. Umsøkjarin skal senda umsókn um útiborðreiðing til fútan, sum síðan sendur umsóknina til ummælis hjá avvarandi myndugleikum.
Stk. 2. Loyvi til útiborðreiðing skal endurnýggjast á hvørjum árið.
Stk.3. Tá tíðarskeiðið er liðugt, skulu allir lutir á økinum, sum loyvið fevnir um, takast burtur og økið ruddast.

Øki

§3 Útiborðreiðing kann vanliga bert fara fram á økinum framvið húsavegginum við sjálvt matsølustaðið.
Stk. 2. Alt virksemi, sum hevur við útiborðreiðingina at gera, skal haldast innanfyri loyvda økið.

Tíðarskeið

§4 Útiborðreiðing kann fara fram alt árið.

Nýtslukostnaður

§5 Fyri nýtslu av kommunalum lendi til útiborðreiðing tekur kommunan gjald. Nýtslugjaldið er tað til einhvørja tíð ásetta krónutal, sum fíggjarnevndin ásetur. Rindast skal frammanundan fyri tíðarskeiðið, ið loyvið fevnir um. Harumframt kann kommunan krevja útreiðslur, ið standast av virkseminum, sum kommunan fær av virkseminum, endurgoldnar.

Upp- og afturlatingartíðir

§6 Upp- og afturlatingartíðirnar fyri virksemið á økinum, ið loyvið fevnir um, skulu halda seg innanfyri niðanfyri ásettu tíðarskeið:

- Mánadag til hósdag kl. 8.00 - 23.00
- Fríggjadag og leygardag kl. 8.00 - 24.00
- Sunnu- og halgidag kl. 16.00 - 23.00

Við serstøk høvi kann eftir umsókn verða givið loyvi til longri upplatingartíð.

Ferðsluviðurskifti

§7 Um borðreitt verður á gongubreyt skal gongubreytin uttanfyri økið, har borðreitt verður, vera minst 1,5 m breið.
Stk. 2. Har nógv gonguferðsla er t.d. á gongugøtu, skal breiddin á gongubreytini vera minst 3 m.

Stk.. 3. Teir lutir, ið verða brúktir í samband við útiborðreiðing t.d. elementir, borð og stólar skulu ikki vera til ampa fyri ferðsluna.

Atkomuviðurskifti

§8 Atkoma til økið hjá loyvishavaranum og matstaðið skal gerast soleiðis, at øll ótarnað kunnu ferðast til og frá.
Stk. 2. Ásetingarnar í kunngerð nr. 149 frá 3 desember 2009 um atkomuviðurskifti, skulu haldast í øllum lutum.

Undirlag

§9 Undirlagið á almenna økinum skal vera tað upprunaliga, so sum flísar, steinar, asfalt ella betong. Loyvt er ikki at leggja annað undirlag omaná tað upprunaliga, so sum timbur, graslíki, teppi o.l.
Stk. 2. Er neyðugt at grava festir, kaðalar ella annað niður í undirlagið, krevst serligt loyvi frá kommununi til tess.

Inngirðing

§10 Útiborðreiðingarøkið skal girðast inni ella avmerkjast í samráð við Tórshavnar kommunu.
Stk. 2. Á torgum og gongugøtum kann loyvi verða givið til at seta upp eina rød av plantukassum í mark millum borðreiðingsøkini, sum liggja við síðurnar av hvørjum øðrum.
Stk. 3. Plantukassar, krukkur og líknandi skulu kunna flytast og mugu í mesta lagi vera 100 cm langir og 40 cm breiðir. Samlaða hæddin av girðingini eigur ikki at verða hægri enn 100 cm.
Stk. 4. Girðing kann verða sett upp kring økið, har tað ber til, og um hendan kann festast trygt í undirlendið. Elementini kunnu vera millum 80 og 100 cm høg og 100 og 120 cm long. Elementini skulu kunna setast saman soleiðis, at garðurin stendur stinnur móti veðri og vindi. Møgulig stuðlabein mugu ikki at røkka út, har fótgangarin gongur.
Stk.6. Girðingin skal verða gjøgnumskygd, í neutralum litum og fella væl inn í myndina og lýsingar mugu ikki festast á.

WC

§11 Frá støðum við útiborðreiðing skal vera atgongd til WC í tilhoyrandi hølunum. Tað skal vera týðiliga uppmerkt, hvar kunda WC er.
Stk. 2. WC-viðurskiftini skulu vera hóskilig í mun til tal av gestum.

Óljóð o.a

§12 Eigarin av virkseminum hevur ábyrgd av, at virksemið ikki elvir til óljóðsampa fyri grannar og onnur, ið ferðast framvið økinum, og at virksemið á økinum ikki tarnar ferðsluni framvið økinum.
Stk. 2. Kommunan kann til eina og hvørja tíð skerja ella taka aftur loyvið til útiborðreiðing, um staðfest verður, at virksemið á økinum, elvir til óljóðsampa fyri grannar og ferðandi framvið økinum ellar tarnar ferðsluni framvið økinum.

Roykampar

§13 Roykur og luktur frá útiborðreiðingarstaðnum skal ikki vera til ampa fyri grannar og onnur, ið ferðast í økinum.

Stk.2. Kommunan kann til eina og hvørja tíð skerja ella taka aftur loyvið, um staðfest verður, at roykur og luktur av økinum elvir til ampa fyri grannar.

Stk. 3. Matgerð á útiborðreiðingarøkinum verður vanliga ikki loyvd. Tó kann søkjast um hissini loyvi.

Burturkast og reinhald

§14 Eigarin av virkseminum hevur ábyrgd av at hóskandi tal av ruskíløtum eru til staðið.

Stk. 2. Eigarin hevur ábyrgd av at halda økið kring matstovuna - og økið, har borðreitt verður - reint og ruddiligt. Hvørt kvøld, tá latið verður aftur, skal økið gerast reint.

Stk. 3. Útbúnaður o.t. eigur at vera reint og væl viðlíkahildi.

Stk. 4. Burturkast skal regluliga beinast burtur sambært kommunalu ásetingunum.

Stk. 5. Ásetingarnar í kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, skulu haldast í øllum lutum.

Útbúnaður

§15 Borð, stólar o.a., sum verður brúkt í sambandi við útiborðreiðingina, skal savnast saman og goymast burtur, tá stongt verður. Hevur loyvishavarin ikki hóskandi goymslupláss til borð, stólar o.a., skal finnast fram til eitt hóskandi goymslupláss í samráð við Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Borð og stólar skulu vera úr haldgóðum tilfari, hóska til heildarmyndina, kunna flytast og atlit skulu takast til rørslutarnaði. Møblar og líknandi mugu ikki festast í undirlendið.

Markisur og hitarar

§16 Parasollur og markisur skulu ikki vera lægri enn 2 m. Litirnir á parasollum og markisum skulu vera neutralir og hóska til umhvørvið. Um markisur skulu festast inn á vegg, skal kommunan kunnast.

Stk. 2. Hitarar kunnu bert festast inn á vegg um brunakrøvini loyva tí. Leysir hitarar skulu standa soleiðis, at teir ikki kunnu koppa.

Stk. 3. Er talan um fastar markisur á vegg krevst byggiloyvi, sí eisini §18.

Skelting

§17 Loyvt verður bert at hava eitt minni frámerki ella skelting við navninum á staðnum, útboðið og prísum.

Stk. 2. Loyvt er ikki at lýsa við vørumerkjum ella veitara.

Bygging

§18 Ikki ber til at byggja ella seta upp fastar installatiónir á kommunalum øki í sambandi við virksemi, ið henda reglugerð fevnir um.

Avmarkingar

§19 Loyvið til útiborðreiðing á kommunalum øki fellur burtur fyribils, um leiðingar, frárensl o.a. á økinum skulu umvælast, ella um vegarbeiði skal gerast, ið krevur, at kommunan kemur inn á økið.

Stk. 2. Í samband við serlig tiltøk í býnum kann Tórshavnar kommuna avmarka loyvi í eitt fyribils tíðarskeið ella taka loyvið aftur.

Stk. 3 Einki endurgjald verður latið loyvishavaranum í sambandi við, at Tórshavnar kommuna avmarkar ella tekur aftur loyvið í eitt avmarkað tíðarskeið í sambandi við vegarbeiði ella serlig tiltøk.

Mishald

§ 20 Verður reglugerðin ikki hildin i øllum sínum lutum, og verða ampar staðfestir av virkseminum á økinum, ið tað ikki ber til at avmarka á munagóðan hátt, kann Tórshavnar kommuna seta avmarkingar í loyvið, t.d. viðvíkjandi upp- og afturlatingartíðum.

Stk. 2. Verða staðfest áhaldandi brot á reglugerðina, og verða hesi ikki rættað uttan dvøl, kann Tórshavnar kommuna uttan aðra ávaring og freist taka aftur loyvið. Loyvið kann fella burtur, um reglugerðin ikki verður hildin, ella um nógvir ampar standast av virkseminum.

Umsókn

§21 Umsóknin skal hava allar neyðugar upplýsingar, so sum:

- Frágreiðing um ætlaða virksemið á økinum,
- mátføst støðumynd yvir økið, har søkt verður um útiborðreiðing,
- mátføst flatmynd við borðuppstilling og upplýsingar um, av hvørjum tilfari og í hvørjum liti innbúgvið er,
- mátføst síðumynd av inngirðing, og upplýsing um hvørjum tilfari og liti, girðingin er gjørd úr,
- upplýsingar um stødd, lit og frámerkir á parasollum/markisum o.ø.,
- Lýsing, tekning/mynd av møblum og øðrum útbúnaði.

Nýtslukostnaðurin fyri útiborðreiðing á kommunalum øki er samtyktur at verða 200 kr. fyri fermeturin um árið.

Samtykt á Býráðsfundi 14. apríl 2011